Sjónarmið:

Ríkjafelagsskapur og samhaldsfesti

Møguleikin fyri semju millum samgonguna og Javnaðarflokkin er enn til staðar. Samgongan kann bjóða tí sjálvstýrishugaða andstøðuflokkinum upp í sítt samstarv og samstundis geva honum ávirkan á tann førda politikkin

Politisk viðmerking eftir Hanus Andreassen

Frá tí henda samgonga varð skipað fyri nú skjótt tveimum árum síðani hava bæði samgongan sjálv og partar av andstøðuni lagt dent á at finna semju í teirra stremban fram ímóti einari meira virðiligari ríkisrættarligari skipan fyri Føroyar.

Semja er neyvan altíð nakað, menniskju eiga at tráa eftir, og tað hendir seg meira enn so, at dyggar niðurstøður spyrjast burtur úr togan stættanna millum og samfelagsligum ella politiskum tvídrátti. Hinvegin vísir søgan, at táið stórmál leika á í einum samfelag ella hjá eini tjóð — eitt nú flagg, mál ella stýrisskipan — kann semja vera natúrlig. Hon ber boð um, at tjóðin er ein heild, og hon byggir grund undir góðum grannalag, eisini eftir at málið ella málini eru loyst. Av hesi orsøk man tann politiska leitanin eftir áralag hesi tvey árini hava sýntst mongum føringi skilagóð.

Miðflokkurin hevur sum kunnugt — við ávísum fyrivarni — verið fúsur at styðja samgonguna. Møguleikin fyri samstarvi við Sambandsflokkin er fyribils neyvan meira enn teoretiskur. Í hesi viðmerking fari eg serliga at hefta meg við leikpartin hjá tí triðja andstøðuflokkinum.

Seinasta vikuskifti boðaði Javnaðarflokkurin — tann stóri andstøðuflokkurin, sum upprunaliga er sprottin úr tí gamla Sjálvstýrisflokkinum — frá síni støðutakan til samráðingaruppleggið hjá samgonguni. Sostatt bendir nógv á, at tann semja, sum mangur føringur hevur viljað havt, og sum hin samráðingarparturin — danska stjórnin — hevur sæð sum ein dyggan fyrimun, er gloppin samgongu og andstøðu av hondum.

Hóast hetta fer undirritaði at loyva sær at føra fram, at møguleikin fyri semju enn er til. Hóast tað kann tykjast, sum hann ikki longur er annað enn teoretiskur, eigur hann at vera nevndur. Men so eigur samstundis at verða nevnt, at skal hesin møguleiki kunna fetta sær á og gerast annað enn teoretiskur, krevjast til hetta fyritreytir, sum viðhvørt sýnast at tróta í føroyskari politiskari siðvenju: hugflog, nýhugsan, stórsinni, tann strategiska hugbirtingin heldur enn tað taktiska smásinnið.

Tað kann vera hóskandi at byrja við at spyrja, hvørjar broytingar føringar sum heild kundu hugsað sær áttu at verið framdar á tí ríkisrættarliga økinum - og síðani at tekna ein frymil ella eittt modell, sum hýsir hesum broytingum. Ynskini kunnu í høvuðsheitum samanfatast í trimum greinum:

(1) At blokkstuðulin verður minkaður á skilagóðan og realistiskan hátt, til hann — kanska um 20 ella 25 ár — fellur burtur.

(2) At tað sínámillum samstarv, sum hesa øldina hevur verið millum Føroyar og Danmark, heldur fram. Ella sagt øðrvísi: at føroyingar varðveita teir møguleikar og tey rættindir — hvat viðvíkir útbúgving, heilsu, mentan osfr. - sum teir higartil hava havt í Danmark — og at danskir borgarar varðveita hesi somu rættindir í Føroyum.

(3) At ríkisfelagsskapurin verður broyttur til ein ríkjafelagsskap millum tvær javnstaddar tjóðir, hvør við sínum tingi og síni stýrisskipan.

Um ein ber hesar tríggjar greinarnar saman, kann tað tykjast, sum tann endaligi frymilin fer at hýsa mótsagnum, sum ikki kunnu sameinast. Til hetta er at siga, at í einari samráðingarstøðu er rætt at byrja við eini ambitiøsari stremban. Vit kunnu leggja aftrat, at summir politikarar — eitt nú í Javnaðarflokkinum - sum hava viðgjørt ta politisku framtíðina, hava ført fram, at alt ber til, bara tann rætti hugburðurin er til staðar — hví so ikki eisini hetta? Fer ein í staklutir, kann verða spurt, hvussu tað skal bera til at einast um eina skipan, sum tykist at geva Føroyum størri fyrimun enn Danmark. Til hetta er at siga, at tað at blokkstuðulin fellur burtur, er í sær sjálvum ein fyrimunur fyri hin partin.

Hetta eru kortini smámál. Tað, sum veruliga hevur týdning í hesum sambandi, er tann søguliga próvgrundin. Tað ítøkiliga samstarvið millum Føroyar og Danmark gongur í hvussu er aftur til o.u. 1620, tá ið Keypmannahavn loysti Bergen av sum handilsbýur hjá føringum, og Føroya próstadømi kom inn undir Sælands biskupsdømi. Hesi sløku 400 árini hevur eitt samstarv verið millum hesi bæði fólkini — av eitt nú kirkjuligum, mentunarligum, útbúgvingarligum, heilsuligum og skyldskaparligum slag — sum kanska er eindømi. Út frá hesum ber til at grundgeva fyri einari millumríkjaskipan, sum er eindømi. Tað, sum brúk er fyri í hesum sambandi, er visióner hugsan.

Javnaðarflokkurin hevur valt at halda fast um ríkisfelagsskapin sum eitt slag av *conditio sine qua non* eina treyt, sum ikki kann vikast. Tað ber til at grundgeva fyri, at henda støðutakan er óneyðuga ósmidlig. Ein kann í staðin fyri hugsa sær henda felagsskap sum eitt hugtak, sum er partur av sjálvum samráðingarevninum — eitt politiskt hugtak, sum átti at kunnað verið umdefinerað, so at tað — innihaldandi somu sínamillum rættindir, sum tað ger nú — hereftir var ein skipan millum tvær sjálvstøðugar tjóðir. Tað átti at borið til at hugsa sær, at ein slík skipan gjørdist veruleiki — væl at merkja eftir at blokkstuðulin varð minkaður burtur og avtikin. Í hvussu so er átti tað at borið til at samráðst við hesi stremban fyri eyga.

Áðrenn farið verður víðari, er neyðugt at spyrja, hvussu tað ber til, at samgongan og tann sjálvstýrishugaði andstøðuflokkurin ikki hava funnið ta semju, sum báðir partar siga seg tráa eftir. Ein av orsøkunum til hetta tykist at vera tann einfaldi veruleiki, at Javnaðarflokkurin er í andstøðu. Í hesi støðu er flokkurin tvingaður til — í tí høvuðsmáli, sum leikar á — at profilera seg í mótsøgn til samgonguna. Tað er lutanna speisemi, at samgongan, tá hon valdi at útihýsa einum potentiellum samstarvsparti, sjálv feldi ein leka inn í ta byrging, hon fór undir at byggja. Ein loysn á hesi støðu tykist — samsvarandi hesum bílæti — púra logisk. Men hon krevur dirvi og nýhugsan. Samgongan kann bjóða tí sjálvstýrishugaða andstøðuflokkinum upp í sítt samstarv og geva honum ávirkan á samgongunnar politikk — eisini á øðrum økjum enn tí ríkisrættarliga, skrívar Hanus Andreassen, rithøvundur, m. a. í sjónarmiðnum í dag

Tað er lutanna speisemi, at samgongan, tá hon valdi at útihýsa einum potentiellum samstarvsparti, sjálv feldi ein leka inn í ta byrging, hon fór undir at byggja. Ein loysn á hesi støðu tykist — samsvarandi hesum bílæti — púra logisk. Men hon krevur dirvi og nýhugsan. Samgongan kann bjóða tí sjálvstýrishugaða andstøðuflokkinum upp í sítt samstarv og geva honum ávirkan á samgongunnar politikk — eisini á øðrum økjum enn tí rikisrættarliga, skrívar Hanus Andreassen, rithøvundur, m. a. í sjónarmiðnum í dag

Í hesi støðu er flokkurin tvingaður til — í tí høvuðsmáli, sum leikar á — at profilera seg í mótsøgn til samgonguna. Tað er lutanna speisemi, at samgongan, tá hon valdi at útihýsa einum potentiellum samstarvsparti, sjálv feldi ein leka inn í ta byrging, hon fór undir at byggja.

Ein loysn á hesi støðu tykist — samsvarandi hesum bílæti — púra logisk. Men hon krevur dirvi og nýhugsan. Samgongan kann bjóða tí sjálvstýrishugaða andstøðuflokkinum upp í sítt samstarv og geva honum ávirkan á samgongunnar politikk — eisini á øðrum økjum enn tí rikisrættarliga. Henda niðurstøða tykist so sólarklár, at ein undrast á, at hon ikki oftari hevur verið frammi. Í tí semju, sum kundi verið gjørd, hevði Tjóðveldisflokkurin ivaleyst noyðst at slakað í raðfestingini — við tí úrsliti, at nýskipanir vórðu framdar, eftir at Føroyar vóru fíggjarliga sjálvbjargnar — og Javnaðarflokkurin á tí prinsipiella økinum, soleiðis at skilja at hugtakið ríkisfelagsskapur verð endurskoðað.

Fyrimunirnir við eini slíkari loysn eru fleiri. Hon kann tryggja ta breiðu semju, sum allir partar tráa eftir, og sum hin samráðingarparturin leggur so stóran dent á. Hon kann tryggja samgonguni ein medleikara, sum frammanundan hevur gott samstarv við donsku stjórnina. Og hon kann tryggja samgonguni dyggari álit og undirtøku millum føringar og í øðrum pørtum av andstøðuni, tá ella um eitt samráðingarúrslit verður sent til fólkaatkvøða.

Men aðrir fyrimunir eru eisini við eini slíkari loysn. Eitt av teimum hugtøkum, sum hevur roynst haldgott í farnu øld, er holisman ella heildarspekin: tann hugsan, at allir tættir í einum likami — eisini tí politiska likaminum — hanga saman. Sambært hesi hugsan er tann ríkisrættarliga strembanin tvinnað saman við hugtøkum sum fólkaræði, rættartrygd, sámiligum umsitingarligum atburði mótvegis landsins borgarum og samhaldsfesti. Tá ið tann føroyski veljarin skal gera sína støðu upp ella atkvøða um tann ríkisrættarliga spurningin, er tað honum ikki líka mikið, hvussu samgongan umsitir hugtøk sum etikk, moral ella sosiala trygd. Sum ábyrgdarfullur flokkur kann Javnaðarflokkurin — í eini samgongu — vera við til at tryggja, at hesi hugtøk verða vird og tekt og sostatt eisini vera við til at tryggja, at borgarin hevur álit á samgonguni.

Tekin eru um, at rákið bæði burturi og heima gongur fram ímóti vaksandi stættamuni. Í Føroyum er hesin mismunur grefligur, ikki minst eftir at samfelagið aftur er á eini aldu av hákonjunkturi. Fleirmillióningar dusa sær við stórum og púra órímiligum samfelagsligum fyrimunum, meðan mong vanlig fólk nóg illa hava til mat og klæðir. Týdningarmikil í hesum sambandi er ætlanin um at seta í verk eina framtíðar trygging fyri fólkið. Um vit hyggja aftur um bak, minnast vit, at føringar sum heild - eisini tey lægst løntu — heftu solidariskt fyri ta veldugu skuld, sum partar av yvirstættini komu sær í í áttatiárunum. Hevði tað ikki verið hóskandi — ikki minst við hesum í huga — at samgongan setti í verk eina samhaldsfasta tryggingarskipan?

Ein slíkur politikkur, førdur av eini víðkaðari samgongu, kundi gróðursett tað álit,ið er ein fyritreyt fyri ríkisrættarligum nýskipanum.

Hanus Andreassen

Einki nýtt svartkjaftaloyvi latið

— Men hinvegin havi eg givið loyvið til, at skip eru skift út við skip við størri veiðuorku. Eg nýtti serstaka undantaksgrein, nevniliga grein 8, til at geva loyvi til eitt nú nýggja Jupiter og til nýggju Norðborg, tí hesir høvdu størri veiðuorku enn teir, sum fóru út. Hetta meti eg ikki er at geva nýggj loyvir, tí talan er um útskiftan, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri

Ólavur í Beiti

– Svartkjaftur í føroyskum sjógvi hevur verið eitt av grundarlagnum hjá m. a. russiskum skipum í 23 ár, og í býti við henda svartkjaft, sum føroysk nótaskip ikki hava fullnýtt, hava føroysk skip fingið eina munagóða kvotu av botnfiski í Barentshavinum, sum hevur havt alstóran týdning fyri føroyska samfelagið hesi farnu 23 árini. Fiskiveiðiavtalan millum Føroyar og Russland verður mett at vera tann fiskiveiðiavtalu, sum gevur mest til føroyska samfelagið.

– Hóast svartkjaftastovnurin hevur verið í stórari menning seinastu árini, so eru tað bert einstøk skip í nótaflotanum, sum hava roynt henda møguleika. Tann størsti parturin av nótaskipunum hava havt nóg mikið av øðrum veiðimøguleikum sum sild, makrel og lodnu. Svartkjaftaveiðan hjá føroyskum nótaskipum hevur verið so lítil, at um vit bert høvdu hesi veiðitøl at dúva uppá, so høvdu Føroyar ikki stór søgulig veiðuhagtøl at vísa á, sigur Jørgen Nioclasen.

Svartkjafturin

Og viðvíkjandi tí komandi svartkjaftabýtinum millum strandalondini, sigur fiskimálaráðharrin, Føroyar hava nógv argumentir fyri, at vit kunnu krevja ein munandi part av stovninum. Fyrst tað lívfrøðiliga, ferðingarmynstri hjá fiskinum, at svartkjaftur er serliga fiskiligur í føroyskum sjógvi, ST-sáttmálan um ferðandi fiskastovnar, har lond, sum liva av fiski eina fáa fyrimun, at vit nú hava skip, ið kunnu fiska og serliga grundað á samstarvið við Russland, hava Føroyar í dag eisini søguligan fiskiskap at vísa á.

– Tann væntandi áhugin frá nótaskipunum hevði við sær, at ídnaðarskip fingu fiskiloyvi at veiða svartkjaft eitt ár í senn av heildarkvotu í norskum og ES-sjógvi og at landsstýrismenn undan mær hava givið 5 føroyskum skipum innflutnings- og veiðiloyvi at veiða svartkjaft fram til 1996. Haraftrat broytti løgtingið lógina um vinnuligan fiskiskap soleiðis, at undantak kundi gevast at veiðiorkan kundi økjast í hesum veiðiflota til tess at geva verandi skipaflota møguleika fyri útskiftingum. Hesar útskiftingar eru gjørdar í tíðarskeiðinum 1998/99 og hevur økt um samlaðu veiðiorkuna hjá hesum veiðiflota.

– Tá eg tók við sum landsstýrismaður vóru harumframt lætnar 4 tilsagnir um innflutningsloyvi til svartkjaftaskip aftrat. Eg tók beinanvegin ta avgerð, at ikki fleiri loyvi skuldu gevast. Men hinvegin havi eg givið loyvi til, at skip eru skift út við skip við størri veiðuorku. Eg nýtti serstaka undantaksgrein, nevniliga grein 8, til at geva loyvið til t. d. nýggja Jupiter og til nýggju Norðborg, tí hesir høvdu størri veiðuorku enn teir, sum fóru út. Hetta meti eg ikki er at geva nýggj loyvir, tí talan er um útskiftan, men er tað m.o. hesi skip, Atli Hansen hugsar um, so eru nýggj loyvir givin.

Næraberg

Og víðari sigur Jørgen Niclasen, at formaðurin í Felagnum Nótaskip tykist at hava so ilt av, at „Næraberg“ nú er komin inn í veiðiflotan og leggur landsstýrismannin undir at nýta undanførslugreinir við at kalla ætlanina eina menningarætlan og harvið skjóta seg undir serstaka grein í lógini um vinnuligan fiskiskap til tess at økja um talið av svartkjaftaskipum so ella so.

– Til hetta er vert at leggja til merkis og skal verða upplýst, at fiskivinnuumsitingin hevur mett sera gjølla um hesa verkætlan, sum er ein menningarætlan,ið skapar grundarlag fyri um 80 arbeiðsplássum aftrat, at føroysk fiskivinna fær møguleika at menna seg til eina meirvirðisvinnu og skapt verður Føroyum eitt framhaldandi grundarlag at gagnnýta okkara tilfeingið (her svartkjafturin) á burðadyggan hátt. Virðið verður fleirfalt fyri sama tonsatal.

2 ár

– Til tess, at verkætlanin kundi gjøgnumførast, varð sett sum treyt, at menningarætlanin sambært § 20, stk. 3 í lógini um vinnuligan fiskiskap er avmarkað til 2 ár. Innan skipinum verður latið fiskiloyvi sum liður í hesi menningarætlan, so skuldu eigarnir skjalprógva fyri Fiskimálastýrinum, at teir høvdu ræði á einum verandi veiðiloyvi at fiska svartkjaft, og sum Fiskimálastýrið hevði góðkent sum grundarlag fyri ætlanini. Eisini varð kravt, at innan 2 ár eru farin, aftaná at skipið er komið undir føroyskt flagg (leiguskrásett), skal skipið verða skrásett í føroysku skipaskránni undir vanligum treytum samstundis sum eigarnir lúka treytirnar í § 7 (ognarviðurskiftini).

– Verða hesar treytir ikki loknar innan 2 ár, so fellur rætturin til nevnda veiðiloyvi burtur. Nevnda veiðiloyvi, sum sipað verður til er veiðiloyvi hjá „Prestland“, sum er heft at hesi menningarætlan. Sostatt er heldur einki nýtt svartkjaftaloyvi latið í hesi verkætlan, sum formaðurin í Felagnum Nótaskip“ og Dimmalætting hava so ilt av, sigur fiskimálaráðharrin at enda til seinastu skrivingina, sum verið hevur um hesi mál.

– Hóast svartkjaftastovnurin hevur verið í stórari menning seinastu árini, so eru tað bert einstøk skip í nótaflotanum, sum hava roynt henda møguleika, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri

Serstaka byggiráðið fyri Reyn skipað

Ráðið, sum skal vegleiða íbúgvum og myndugleikum um, hvussu farast skal fram í søguliga umhvørvinum úti á Reyni í Havn, hevur nú skipað seg

Eirikur Lindenskov

Serstaka byggiráðið fyri býlingin úti á Reyni í Havn hevur nú skipað seg. Í ráðnum sita Jórun í Dali, sum er forkvinna, Ovi Mortensen, býararkitektur, sum er skrivari og Símun Arge fornfrøðingur, ið er nevndarlimur.

Serstaka byggiráðið fyri Reyn hevur tríggjar limir, sum umboða ávikavist íbúgvarnar í býlinginum, Tórshavnar býráð og Føroya Landsstýri/Føroya Fornminnissavn.

Jórun í Dali umboðar íbúgvarnar, meðan hinir báðir umboða ávikavist Tórshavnar býráð og Føroya Fornminnissavn.

Serstaka byggiráðið hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina. Eisini skal ráðið serstakliga viðgera allar spurningar, ið hava samband við útsjónd húsanna, stendur í byggisamtyktini, sum er samtykt av Tórshavnar býráð 25. apríl 1972 og góðkend av landsstýrinum 25. mars 1973.

Serstaka byggiráðið skal samstundis hjálpa við leiðbeiningum tá onkur, sum vil byggja ella umvæla eina ogn, ið liggur innan fyri hesa byggisamtykt, leggur fyrispurningar fyri tað.

Hóast byggisamtyktin fyri Reyn hevur verið til í meira enn fjórðingsøld, hevur serstaka byggiráðið ikki virkað eftir ætlan øll hesi árini. Men fyri nøkrum árum síðani tóku íbúgvar stig til at endurreisa ráðið, og hesum tóku bæði Tórshavnar býráð og Fornminnissavnið undir við.

Fleiri byggimál hava seinastu tíðina verið, har íbúgvarnir hava verið misnøgdir við mannagongdina hjá Tórshavnar býráð, sum ikki hevur fylgt byggisamtyktini, sum t. d. tá Sersjantahúsini vórðu flutt út á Skúlareyn, og nú Tórshavnar býráð játtaði privatpersóni at byggja sethús á neystagrundina úti í Bakka. Hetta seinna málið varð steðgað í landsstýrinum, sum í slíkum føri skal jatta kommunum at avhenda almennar ognir. Fyrra málið varð trumfað fígjøgnum, hóast íbúgvarnir mótmæltu.

Nú ráðið er skipað. vænta íbúgvarnir, at ivaspurningar kunnu verða greiddir, áðrenn myndugleikarnir taka avgerðir. Teir vænta eisini, at hetta tryggar, at serstaka byggisamtyktin verður fylgd.